# Umstrídda SEV-tornið í Øravík møguliga friðast

**– Friðingarmyndugleikarnir hava fyribils forðað fyri, at tað umstrídda SEV-tornið í Øravík verður flutt. Nú er ístaðin fyri bilaverja sett upp framvið vegnum**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*

Tað er nú óvist um tað nógv umstrídda SEV-tornið í Øravík verður flutt.

Tornið hevur staðið sera illa fyri, hvat ferðslutrygdini viðvíkur. Tað stendur beint við vegjaðaran, mitt í einum svingi. Og tað er fleiri ferðir hent, at bilar eru farnir útav í svinginum og hava rent á tornið, tí har er heldur ongin bilaverja framvið vegnum sum forðar fyri, at bilar, sum fara útav, rena á sjálvt tornið.

Seinastu árini er kravið um at fáa bøtt um ferðslutrygdina á hesum vegastrekkinum alsamt harðnað.

Og í summar kom tað so hartil, at gjørt varð av at flyta tornið burtur frá vegnum.

SEV og Landsverkfrøðingurin samstarvaðu um ætlanina og skuldi býta útreiðslurnar, ið stóðust av at flyta tornið burtur frá vegnum. Ætlanin var at taka hetta tornið niður og at byggja nýtt torn nakað longri burtur frá vegnum.

Ætlanin var at flyta tornið nú í heyst.


*Friðingarmyndugleikarnir skulu nú kanna, um tað umstrídda tornið í Øravík skal friðast. Tí hava teir nú forðað fyri, at at tað verður flutt. Ístaðin hevur Landsverkfrøðingurin nú sett bilaverju upp framvið vegnum*

### Tornið friðast

Men í farnu viku hava fólk varnast, at ístaðin fyri at flyta tornið, er Landsverkfrøðingurin nú farin at gera bilaverju framvið vegnum, har sum tornið stendur.

Orsøkin til tað er, at nú er tað óvist, um tornið yvirhøvur verður flutt.

– Tá ið tað frættist, at tornið skuldi flytast, gjørdu friðingarmyndugleikarnir vart við seg og forðaðu fyribils fyri, at tornið varð flutt, sigur Klæmint Weihe, stjóri í SEV.

Hann sigur, at friðingarmyndugleikarnir skulu nú skal tað kanna, um tornið skal friðast. Og fyrenn eitt úrslit fyriliggur av teirri kanningini, verður tornið ikki flutt, sigur stjórin í SEV.

Hvussu leingi slík viðgerð tekur, vita vit ikki.

SEV hevur sjálvt ásannað, at tornið er serstakt og hevði ætlað at varðveitt tað. Av tí sama varð tað umvælt og sett í stand fyri eina fittliga upphædd fyri nøkrum árum síðani.

Tað er bygt seinast í tjúgunum av tigilsteini og hetta slagið av tornum vórðu bara bygd í Suðuroy. Men eftir at kravið um at fáa tað flutt, alsamt harðnaði, gjørdi SEV kortini av at flyta tað í heyst í samstarvi við Landsverkfrøðingin.

Men, nú friðingarmyndugleikarnir hava lagt uppí málið, hevur Landsverkfrøðingurin ístaðin gjørt av at seta bilaverju upp framvið vegnum, har tornið stendur.

Eftir, hvat vit hava fingið upplýst, er tað Fornminnisnevndin, sum hevur tikið málið um tornið upp, men tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking haðani, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Hava biðið sakførara kanna Gjaldsstovuna

**Sumbiar Kommuna hevur sett kanningar í verk, sum fara at fáa stóran týdning fyri rættartrygdina hjá øllum kommunum í Føroyum**

RÆTTARTRYGD
*Áki Bertholdsen*

Hevur Gjaldsstovan loyvi til at afturhalda kommunuskatti hjá kommununum, uttan at tær hava givið loyvi til tað?

Hetta er spurningurin, sum Sumbiar Kommuna nú vil hava svaraðan.

Kommunan hevur biðið sakførara kanna, um Føroya Gjaldsstova hevur heimild til at draga ymisk gjøld frá kommunuskattinum hjá kommununum, uttan at tað er eftir greiðari avtalu við kommunurnar.

Jacob Vestergaard, borgarstjóri í Sumbiar Kommunu, sigur, at tað kemur oftani fyri, at tá ið kommunurnar fáa kommunuskattin utgoldnan, hevur Gjaldsstovan fyrst drigið ymisk gjøld frá, sum kommunan hevur at betala.

Beinleiðis orsøkin til, at Sumbiar Kommuna nú hevur beitt sakførara á Gjaldsstovuna, er, at hon hevur drigið eina stóra upphædd frá kommunuskattinum hjá Sumbiar Kommunu, uttan at kommunan hevur givið loyvi til tað og sum kommunan harafturat ikki er sinnað at betala.

Talan er um eina rokning, sum Landsverkfrøðingurin hevur sent Sumbiar Kommunu fyri asfaltering í kommununi.

Sumbiar Kommuna og Landsverkfrøðingurin eru ósamd um rokningina, men Gjaldsstovan ger ikki mætari enn at hon dregur upphæddina frá kommunuskattinum, áðrenn kommunan fær skattin útgoldnan.

– Áðrenn, vit fóru undir asfalteringina, bóðu vit Landsverkfrøðingin um eina leyðsliga meting av, hvat tað fór at kosta. Men tá ið vit fingu rokningina, var hon so stór, at hon á ongan hátt stóð mát við kostnaðarmetingina, sigur Jacob Vestergaard.

– Vit halda als ikki, at tann tænasta, vit hava fingið frá Landsverkfrøðinginum á nakran hátt stendur mát við rokningina, vit hava fingið.

– Tilsamans var rokningin frá Landsverkfrøðinginum upp á 800.000 krónur, men kommunan er ikki sinnað at betala meiri enn áleið helvtina.

– Men tá ið kommunan ikki vil betala, ger Landsverkfrøðingurin ikki mætari, enn at hann sendir Gjaldsstovuni rokningina og biðjur hana draga eftirstøðuna frá kommunuskattinum, áðrenn kommunan fær hann útgoldnan.

– Og tað hevur Gjaldsstovan gjørt fyri ein part, tó at hon ikki enn hevur drigið alla eftirstøðuna frá, sigur borgarstjórin.

### Ongin rættartrygd

Jacob Vestergaard sigur, at eftir hansara tykki er hetta at taka rættartrygdina, sum øll onnur í samfelagnum hava, frá Sumbiar Kommunu.

Og letur slík mannagongd seg gera, er hetta fullgott prógv um, at rættartrygdin hjá kommununum yvirhøvur er ikki til staðar.

– Tá ið Landsverkfrøðingurin ikki fær peningin við góðum frá okkum, tí vit eru ósamd um rokningina, ger hann ikki mætari enn at hann fær Gjaldsstovuna at vera innkrevjara fyri seg og at fara í kassan hjá kommununi eftir pengunum.

Hann sigur, at Landsverkfrøðingurin og Gjaldsstovan gera hetta neyvan uttan so at tey halda, at tey hava heimild til tað.

– Men vit halda framvegis, at hetta er at taka rættartrygdina frá okkum. Heldur Landsverkfrøðingurin seg hava pening til góðar hjá okkum, eigur hann at fara sama veg, sum øll onnur fara í slíkum málum og tað er ígjøgnum rættarskipanina, tí rætturin er amboðið, vit hava til slík mál í einum samfelagi sum okkara og tí skuldi Landsverkfrøðingurin stevt okkum eftir pengunum.

Jacob Vestergaard sigur, at Sumbiar Kommuna tí hevur biðið sakførara kanna, um Gjaldsstovan hevur heimild til at afturahalda kommunuskatti undir slíkum umstøðum, uttan at kommunan hevur givið tilsøgn um tað, ella beinleiðis er dømd til at gjalda.

– Er niðurstøðan, at Landsverkfrøðingurin ikki hevur heimild til tað, er ætlanin at stevna Gjaldsstovuni eftir pengunum.

– Vísir tað seg hinvegin, at Gjaldsstovan hevur heimild til tað, eru kommunurnar rættiliga illa fyri og so eigur málið at verða tikið upp.

Hetta er sostatt eitt prinsippmál, sum Sumbiar Kommuna nú vil hava avgjørt.


*– Sumbiar Kommuna og Landsverkfrøðingurin er blivin ósamd um eina rokning fyri asfaltering. Men ístaðin fyri at stevna eftir pengunum, ger Landsverkfrøðingurin ikki mætari enn at hann fær Gjaldstovuna at draga teir teir frá kommunuskattinum, áðrenn kommunan fær hann útgoldnan. Hetta vil kommunan ikki finna seg í, tí nú er rættartrygdin burtur, sigur kommunan*



# Stásiligur nýggjur útróðrarbátur

**Ein spildurnýggur og nýmótans útróðrarbátur er komin afturat í útróðrarflotanum. Tað er eitt felag í Havn, sum hevur keypt bátin. Skipameklarin í Føroyum er ikki í iva um, at hetta er ein fantastiskur bátur**

ÚTRÓÐRARBÁTUR
*Heri á Rógvi*



Immanuel eitur nýggjasti og helst eisini stásiligasti báturin í føroyska útróðrarflotanum. Hann er kanska eisini tann dýrasti, men tað hevur ikki eydnast okkum at fingið ein keypsprís upplýstan.

Tað er smápartafelagið Immanuel, sum hevur keypt bátin við sama navni. Báturin er smíðjaður í Norra hjá E. Vikssund. Sambært skipameklaranum, Oddmar Juul Samuelsen, so er hetta ein heilt fantastiskur bátur. Tað eru góðar tríggjar vikur síðani, at báturin kom til landið. Tað var upprunaliga ætlanin, at báturin skuldi koma eitt sindur fyrr. Oddmar Juul Samuelsen upplýsir, at tað er stórur áhugi bátum av hesum slag millum føroyingar og eisini uttanlands. Eisini hava útlendskir fjølmiðlar víst hesum bátinum áhuga.

### Nýmótans

Tað verður ikki spart uppá jalig lýsingarorð, tá vit spyrja okkum fyri um sjálvan bátin. Báturin er 11,3 m. langur, 4,3 m. breiður, 1,7 m. djúpur og er 15 bruttotons. Báturin hevur ein 430 hestar motor, og kann hann sigla eini 10-12 míl. Báturin hevur allar hugsandi hentleikar sum eitt nú radar, ekkolodd, GPS, VHF, kortplottar og autopilot. Báturin kann hava eini 20.000 pund av fiski í lastini av nýveiddum fiski.

Allir hentleikar eru eisini til staðar, tá hugsað verður um, hvussu menn skulu uppihalda sær umborð. Tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki hjá 4 monnum at búleikast umborð í einar tríggjar dagar.

Tað, sum kanska eyðkennir nýggja bátin mest, er tann sera framkomna egnimaskinan, sum er umborð. Hetta fer at lætta almikið hjá monnunum umborð, siga teir sum vita.

Trygdin sigst eisini at vera heilt fyrimyndarlig umborð.

### Vinna pengar

Oddmar Juul Samuelsen er ikki í ivi um, at hetta er sera góður bátur. Hann heldur ikki, at tað er avgerðandi, hvat ein tílíkur bátur kostar, men heldur er tað avgerðandi, at menn fáa møguleikan at vinna pening burturúr.

– Tað er ein eftirspurningur eftir húkaveiddum fiski í Evropa, tí kann tað eisini fáast nógvur peningur fyri hendan, sigur Oddmar Juul Samuelsen.

Hesin báturin sigist eisini at vera betri førur fyri at koma skjótt við feskum fiski, tá hetta er rættiliga avgerðandi í søluni í dag.

Sum áður nevnt, so er tað stórur áhugi fyri bátinum, bæði í Føroyum og uttanlands. Oddmar Juul Samuelsen væntar, at nógvir fara at fylgja spentir við, hvussu leikur fer við nýggja bátinum. Tí tað er kanska ikki óhugsandi, at fleiri tílíkir bátar koma afturat.

Sosialurin ynskir øllum pørtum tillukku við nýggja Immanuel.

# Fara at gera nýggja maskinsmiðju

**Gamli fiskasentralurin er farin í søguna, og ætlanin er at byggja ein nýggjan bygning, har ein nýggj smiðja og goymsla skulu húsast**

BYGGING
*Heri á Rógvi*



Tórshavnar skipasmiðja telist millum størstu arbeiðspláss í landinum. Ein so stór fyritøka hevur eisini innímillum tørv á nýggjum hølum. Skipasmiðjan húsast í dag við eystaru bryggju í Havn. Fyri stuttari tíð síðani varð gamli fiskasentralurin tikin niður, tá hesin hevði tænt fyri seg.

Gunnar Mohr annar av monnunum á ovasta rók hjá Tórshavnar skipasmiðju sigur við Sosialin, at ætlanin er at gera ein nýggjan bygning, har sum fiskasentralurin hevur verið.

Nýggi bygningurin skal eftir ætlan vera liðugur næsta summar. Bygningurin skal eftir ætlan hýsa maskinsmiðju og goymslu. Ætlanin er at samla alt niðri við kaiina, sigur Gunnar Mohr, stjóri.

Føroya Tele:

# Feilur í avrokningarskipanini

**– Feilir í avrokningarskipanini gera, at onkrar internet-rokningar ikki verða sum tær skulu, sigur Hjalgrím Hentze, tekniskur stjóri á Føroya Tele. Feilirnir eru tískil grundin til, at kundarnir viðhvørt fáa óskilaðar rokningar frá Føroya Tele**

INTERNET-ROKNINGAR
*Ingrid Bjarnastein*

Í Sosialinum í gjár skrivaðu vit um kunda hjá Føroya Tele, ið var ónøgdur við internetrokning, ið varð send honum. Grundin til at kundin var ónøgdur var, at hann hevði fingið eina óskilaða internetrokning, og fekk ikki nøktandi svar frá Føroya Tele.

Tá tað kom til stykkis var rokningin avlop frá undanfarna mánaða, og kundi hetta prógvast hjá Føroya Tele.


*Hjalgrím Hentze, tekniskur stjóri á Føroya Tele*

Hjalgrím Hentze sigur, at tað er avgjørt skeivt, at kundin ikki fær at vita, hví rokningin sær soleiðis út, tá talan er um eina restupphædd frá mánaðanum frammanundan.

– Tað er ógvuliga keðiligt, at slíkt kemur fyri, men vit kunnu heldur ikki tryggja, at slíkt ikki hendir aftur, sigur Hjalgrím Hentze.

Sambært tekniska stjóranum á Føroya Tele, sigur hann, at feilir kunnu stinga seg upp, og harvið kemur ólag á avrokningarskipanina. Tá rokningin verður skrivað vita tey, ið skriva rokningarnar, at tað er avlop frá undanfarna mánaða, og tí skuldu tey gjørt eina viðmerking á rokningina ella viðlagt bræv, ið greiddi frá støðuni,

– Upphæddin, ið gjaldast skuldi var røtt í krónum og oyrum, men tað var bert tíðarskeiðið, ið ikki var rætt, sigur Hjalgrím Hentze at enda.

Men hóast peningaupphæddin er tann rætta, hevur Føroya Tele framvegis skyldu til at upplýsa kundan, hvat tað er, ið hann skal gjalda fyri.

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

Bilarnir finnast eisini á www.nissan.fo

Meinhardt Argo